# Kjak



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

## Takk fyri svarið

Í farnu viku setti eg nakrar spurningar til verkætlanarbólkin, sum arbeiðir við at gera ein 50 metra langan svimjihyl í Vági. Bólkurin var skjótur at svara, og tað vil eg takka teimum fyri

Eg havi als einki ímóti at kostnaðurin á tílíkum arbeiðum fer niður. Tvørturímóti kann tað ofta vera ilt at skilja, hví prísirnir eru so høgir sum teir maangan eru. Tá ið so ein ætlan verður løgd fram, sum kostar so nógv minni enn tað vanliga, verður tað áhugavert at vita, hvør orsøkin er til henda lægra kostnaðin.

Eg skilji svarið frá fyrireikingarbólkinum soleiðis, at landið skal bara játtað 4 mió. krónur til íløguna, og einki meira enn tað. Raksturin av svimjihøllini verður uttan stuðul frá landskassanum, um eg havi skilt svarið rætt. Fyrireikararnir eru vælkomnir at rætta meg, um hetta er misskilt.

Ein sjálvsognarstovnur skal eiga høllina, og tað merkir helst, at einki meirvirðisgjald verður goldið fyri byggingina, men tað er so tað...

Eg setti spurnartekin við undirlendið, tá høllin skal rúma eini so ovurhonds stórari nøgd av vatni, men um so er, at ein verkfrøðingur hevur sagt gott fyri tí, so fari eg sjálvandi ikki at siga nakað annað, sjálvt um eg framvegis haldi, at tað ljóðar ótrúðligt.

Eg ivist framvegis í, um arbeiðið kann ganga so skjótt, at tað verður svimjandi longu í fyrsta ársfjóðringi í komandi ári, men tað hevur sum so minni at siga.

Verkætlanarbólkurin endar við at siga, at ætlanin er ikki at brúka tíð og orku til blaðkjak um verkætlanina. Tað skilji eg væl, men haldi kortini, at tað er umráðandi fyri allar partar, at fáa málið so væl lýst sum til ber. Tí fari eg enn einaferð at takka fyrireikarunum fyri, at teir gjørdu sær ómak at svara. Samtíðis fari eg at biðja teir um at rætta meg, um eg havi misskilt okkurt (serliga hatta við, at landið ikki skal stuðla rakstrinum).

---



**Richard Danielsen**

## Móselóg, jødar og heidningar

**3. partur**

Eg havi í tveimum undanfarnum pørtum reint at vísa á, at lógin og fyriskipanirnar vóru givnar teimum umskornu (Jødunum). Allar hinar tjóðirnar lat Harrin ganga sínar egnu vegir. Áp.14,16. Ísraels fólk er eitt serligt fólk, sum Gud hevur útvalt til eina serliga uppgávu, m.a. til at vísa á sín heilagleika og við lógini vísa strongu krøv síni.

Hóast at Gud gav Ísrael lógina, so visti hann, at teir fóru ikki at halda hana. Hann kennir alt frammanundan. Í Nýggja Testamenti fáa vit eina greiða vitan um, hvussu hesir lutir skulu skiljast. Serliga ger Paulus hetta greitt í Rómbrævinum og Galatiabrævinum. Her skal ikki verða farið í smálutum um, hvussu hetta er, men í stuttum kunnu vit siga, at Paulus lærir púra greitt, at frelsan er við trúgv á Kristus og ikki av lóverkum. Hann vísir t.d. á, at arvurin var givin Ábrahami við lyfti. Gal. 3,18. Vers 16 sigur:

Nú vórðu lyftini givin Ábrahami og avkomi hansara; ikki stendur „avkomum", sum um nógvar, men sum um ein: „Og avkomi tínum" – og tað er Kristus.

Hetta vísir heilt aftur til 1. Mós. 12,3:

Eg skal signa tey, ið signa teg, og tann, ið tær bannar, honum skal Eg banna; og í tær skulu allar ættir á jørðini verða signaðar."

Paulus sigur víðari í sama kapitli í Galatiabrævinum:

Tað, sum eg vil siga, er hetta: Sáttmála, ið frammanundan er staðfestur av Gudi, kann lógin, sum kom 430 ár seinni, ikki seta úr gildi, so hon skuldi gjørt lyftið til einkis. Vers 17.

Síðani fer Paulus víðari og sigur:

Hvat skuldi lógin tá til? Jú, hon varð løgd aftrat, fyri at lógbrotini skuldu koma fyri dagin – inntil avkomið kom, sum lyftið var givið – og hon varð givin við einglum – við millummans hond. Ver19.

Men skriftin hevur lagt alt inn undir synd, fyri at tað, sum lovað var, skuldi við trúgv á Jesus Kristus verða teimum givið, sum trúgva. Áðrenn trúgvin kom, vórðu vit hildin innistongd, og lógin helt vakt yvir okkum – inntil trúgvin, ið koma skuldi, opinberaðist. Soleiðis er lógin vorðin tyktari okkara – til Kristus, fyri at vit skuldu verða rættvísgjørd við trúgv. Vers 22-24.

Paulus er heilt avgjørdur í, at tann sum trýr á Kristus er leysur av lógini og hevur einki við hana at gera. Í 25. versi sigur hann soleiðis:

Men nú trúgvin er komin, eru vit ikki longur undir tyktara.

Í Ápostlasøguni 15. Kap. lesa vit nakað sera áhugavert. Har vóru nakrir, sum vildu at trúgvandi heidningar skuldu verða umskornir og fáa boð um at halda Móselóg. Tá reistist Pætur og segði hetta m.a.:

Hví freista tit tá nú Gud við at leggja ok á háls lærisveinanna, sum hvørki fedrar okkara ella vit hava verið mentir at bera! Vit trúgva jú, at vit verða frelstir av náði Harrans Jesusar – vit líka væl sum teir!" Vers 10-11.

So skriftirnar læra, at frelsan er við trúgv á Jesus Kristus. Lógin var givin Ísrael, sum ein liður í ævigu ætlan Guds, fyri at vísa á heilagleika Guds, og fyri at hon, lógin, skal reka okkum til Kristus.

Vit, sum ikki eru jødar, men eru komin til trúgv á Harran Jesus Kristus, hava einki við lógina at gera. Og tey, sum ikki eru frelst, mugu ikki prøva uppá at halda lógina fyri at verða frelst, tí tað er ómøguligt at verða frelstur á nakran annan hátt enn við trúgv á Jesus Kristus. **Tó hongur lógin, sum ein hóttan yvir hvørjum gudleysum menniskja.**

Paulus sigur soleiðis í 1. Timoteusar brævi 1,8-11:

Vit vita, at lógin er góð, um onkur nýtir hana, sum lógin eigur at verða nýtt, so hann skilir hetta, at lógin er til, ikki fyri hin rættvísa, men fyri lógleys og sjálvráðin, gudleys og syndarar, vanheiløg og óandalig, fyri slík, sum nýta yvirgang móti faðir og móður, fyri manndráparar, siðloysingar, tey, sum synda móti náttúruni, menniskjatjóvar, lygnarar, meinsvorin – og alt annað, sum er ímóti hini heilnæmu læru, eftir evangeliinum um dýrd hins sæla Guds, sum mær er litið upp í hendur.

So niðurstøðan er, at Gud kallaði Ábraham í forðum og gav honum lyftið um landið, sum avkom hansara skuldi fáa í ogn. Hann gav honum lyfti um, at av avkomi hansara skuldi frelsari heimsins koma, ikki bara frelsari ísraelsmanna, men als heimsins. **Lógin var givin seinni við Mósesi, og var bert ein liður í frelsuætlan Guds, hon vísir ómetaligu høgu krøv hins hægsta og rekur okkum til Kristus, sum er einasti vegur til frelsu. Lógin kann ongan frelsa, og tey, sum hoyra Harranum til hava einki at gera við lógina, men eru frídkeypt frá henni við ofri og deyða Harrans Jesusar.**

Tann álvarsami spurningurin er tí, hevur tú vent við og lati teg frelsa í blóði Kristusar, sum er einasta offur fyri synd, ella gongur tú enn eina leið, sum tú ikki veitst hvar hon endar, hvat í endin verður av tær?

**Endi**